UTTAN ÚR HEIMI

Minst tvær bumbur um árið

Amerikanska fregnartænastan skrivar í einari nýggjari frágreiðing, at Norðurkorea er í ferð við at útvega sær so mikið av urani, at landið verður fært fyri at gera minst tvær kjarnorkubumbur um árið.

Fyrr hevur CIA sagt, at Norðurkorea helst hevur eina ella tvær kjarnorkubumbur á goymslu longu nú, og í nýggju frágreiðingini, sum varð løgd fyri kongressina hósdagin, stendur eisini, at norðurkoreanar helst eisini hevur væl at evnafrøðiligum vápnum.

Viðurskiftini millum USA og Norðurkorea hava verið spent seinastu mánaðarnar, eftir at tað kom fram, at Norðurkorea hevði tikið uppaftur kjarnorkuverkætlanina, sum landið annars steðgaði í 1994.

Andstøðumaður 25 ára fongsul

Dómvaldið á Kuba hevur dømt politiska andstøðumannin Oscar Elias Biscet 25 ára fongsul fyri undirgravingarvirksemi ímóti myndugleikunum.

Kona mótsatøðumansins, Elsa Morejon, sigur, at maður hennara er ósekur, og hon leggur afturat, at sjálvt tann harði dómurin fer ikki at fáa mannin at víkja frá sínum sjónarmiðum, tí hann er sannførdur um, at tey eru røtt.

Fyrr í vikuni vórðu 71 politiskir andstøðingar á Kuba dømdir fongsulsrevsingar úr 12 upp í 27 ár. Tey flestu vórðu dømd fyri at hava samstarvað við USA ímóti kubanska stýrinum. Eygleiðarar siga, at dómarnir eru eini greið boð frá kubanska leiðaranum, Fidel Castro, um, at kubanska stjórnin góðtekur onga amerikanska uppílegging í innanhýsis viðurskiftini á Kuba.

Ósigur til Le Pen

Víðgongdi franski høgrapolitikarin Jean Marie Le Pen hevur nú endaliga mist sætið í ES-tinginum.

Ein dómstólur í Strasbourg avgjørdi fyrradagin, at ES-tingið hevði rætt, tá tað fyri trimum árum síðani gjørdi av at blaka Le Pen úr tinginum. Upprunin til avgerðina hjá ES-tinginum var, at franska dómsvaldið hevði gjørt av, at Le Pen var ikki egnaður at sita í nøkrum almennum starvi. Upprunin til ta málið var ein tilburður í 1997, tá Le Pen leyp á ein kvinnuligan sosialistiskan politikara.

Aftan á avgerðina hjá dómstólinum í Strasbourg kunngjørdi formansskapurin í ES-tinginum, at Jean Marie Le Pen hevði mist sætið í tinginum frá 10. apríl.

Hítirnar hildu ikki

Í vikuni royndi ein maður úr Peru at smugla meiri enn hundrað hítir, sum hann hevði fylt við kokaini, til Suðurkorea.

Maðurin hevði svølgt tær nógvu hítirnar, men á flogferðini til Seoul var hann so óheppin, at tríggjar av hítunum brustu í maganum á honum. Tá flogfarið var í ferð við at seta seg í Seoul, kæmdi maðurin seg um, at hann hevði so ilt í maganum. Hann var ð tí fluttur á sjúkrahús, so skjótt sum flogfarið hevði sett seg, men læknarnir fingu einki gjørt.

Suðurkoreanska løgreglan sigur, at tann 35 ára gamli Hugo Jose Collazos Hidalgo hevði svølgt 115 hítir við 900 gramum av kokaini. Um deyðsorsøkina verður sagt, at hann doyði av ovurnýtslu.

Hjálparfólk tora ikki til Irak

Vanliga gøtumyndin í Bagdad í dag: Ránsmenn á veg til hús við fongi

Í Bagdad er rættiligur ruðuleiki. Fólk ræna frá hond, og støðan ger, at hjálparfelagsskapir hætta sær ikki til Irak við neyðhjálp.

KRÍGGJ Í IRAK
Árni Joensen:

Seinastu dagarnar og nætur-nar hevur rættiligur ruðuleiki valdað í iraskra høvuðsstaðnum. Fólk reika aftur og fram og ræna alt, sum tey kunnu fáa hendur á, og tað er heldur einki mark fyri, hvat verður rænt, ella hvar rænt verður.

Altjóða Reyði Krossur sigur, at fólk hava millum annað verið inni á fleiri sjúkrahúsum í Bagdad, haðani tey hava rænt bæði heilivág, útgerð og innbúgv. Viðurskiftini á sjúkrahúsunum í býnum vóru ring frammanundan, og tað, at tey nú eisini verða rænd, ger støðuna so mikið verri, sigur Reyði Krossur.

Samstundis siga útlendskir hjálparfelagsskapir, at teir tora ikki at senda fólk til Irak við neyðhjálp, tí viðurskiftini eru so ótrygg. Eitt nú stenda nógv tons av neyðhjálparútgerð í Jordan, og bæði heimsheilsustovnurin WHO og Reyði Krossur hava boðað frá, at teir fara ikki at senda síni fólk til Irak, fyrr enn støðan er batnað.

Óskilið ræður ikki bert í Bagdad, siga hjálparfelagsskapirnir. Har vesturi í Irak er eingir amerikanskir hermenn, og har ræður lógloysi. Har suðuri í landinum er støðan lítið mætari, sigur Reyði Krossur. Neyðhjálp, sum varð send tann vegin, varð alt fyri eitt rænd.

Amerikanska herleiðslan sigur, at hon hevur ikki hermenn til at forða ránsmonnunum, tí hermenninir eru framvegis í bardaga við irakar - eisini í sjálvum Bagdad.

Iraksku leiðararnir horvnir

Tað er ikki bara Saddam Hussein, sum er horvin, eftir at Bagdad fall. Heldur ikki hinir iraksku leiðararnir eru at finna.

KRÍGGJ Í IRAK
Árni Joensen:

CIA-agentar og servandir amerikanskir hermenn, sum í loyndum hava verið í Bagad seinastu tíðina, varnaðust mikudagin, at allir leiðararnir í Baathflokkinum, Tjóðarhirðini og stjórnini vóru horvnir. Heldur ikki kunningarmálaráðharrin, sum fleiri ferðir um dagin hevði verið á almenna sjónvarpsskiggjanum, var at finna.

Amerikanararnir, sum vóru farnir til bagdad at finna Saddam Hussein deyðan ella livandi, leitaðu um allan høvuðsstaðin, men leiðararnir vóru sum farnir undir heilt. Samstundis frættist frá óheftum keldum, at upptøkutól, sum CIA hevði sett ymsastaðni í býnum, vóru horvin.

Herleiðslan í Qatar fekk bert at vita, at alt samskiftið var bráðliga hildið uppat, og at leiðararnir vóru ikki komnir til arbeiðis, sum teir annars høvdu gjørt hinar dagarnar.

Amerikanararnir halda, at Saddam Hussein ivaleyst er farin til býin Tikrit, haðani hann er ættaður, meðan onnur halda, at hann kanska er farin til Sýrialands. Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, hevur sagt, at amerikanarar hava fingið upplýsingar, sum benda á, at ávísir irakskir leiðarar hava leitað sær skjól í Sýrialandi.

Amerikanski Irak-serfrøðingurin Kenneth Pollack heldur, at Saddam Hussein er farin úr Irak.

Í gjár segði amerikanski uttan´íkisráðharrin, Colin Powell, at tá saman um kemur, hevur tað ikki so stóran týdning, hvar Saddam Hussein er, ella um hann er deyður ella livandi.

UTTAN ÚR HEIMI

Arabisk lond leggja USA undir loyniliga ætlan

Amerikanska ætlanin at skipa eina fyribilsstjórn í Irak við fyrrverandi generalinum Jay Garner sum leiðara møtir mótstøðu í øðrum arabiskum londum.

AFTAN Á KRÍGGIÐ
Árni Joensen:



Í nógvum muslimskum londum hava fólk mótmælt amerikanska álopinum á Irak. Heru eru tað sunnimuslimar í Pakistan, sum mótmæla.

Egyptaland, Saudiarabia, Sýrialand og Arabiski Eindarfelagsskapurin eru av teirri áskoðan, at irakar skulu sum skjótast sleppa at velja sína egnu stjórn.

- Irakska fólkið eigur at fáa rætt til at skipa sína egnu stjórn. Einki fremmant land eigur at noyða eina stjórn oman yvir irakska fólkið, sigur Amr Mussa, sum er formaður í Arabiska Eindarfelagsskapinum.

Eisini Saudiarabia, eitt land við sera avmarkaðum demokratii, hevur tikið til orðanna fyri, at irakar eiga at sleppa at velja sítt egna stýri. Tilsvarandi viðmerkingar eru komnar úr Bahrein og úr Jordan.

USA hevur fleiri ferðir ávarað Sýrialand ímóti at hjálpa irakum í krígnum ímóti amerikanarum og bretum. Tað hevur fingið Sýrialand at biðja altjóða samfelagið gera sítt til at fáa enda á útlendsku hersetingini í Irak og teirri álvarssomu støðuni, sum hesin ágangurin hevur elvt til, soleiðis sum stjórnin í Damaskus orðar tað.

Garner og Ísrael

Eygleiðarar í tí arabiska heiminum siga, at viðmerkingarnar úr teimum arabiskú londunum bera týðiliga boð um ein illgruna um, at USA hevur eina loyniliga ætlan við at seta júst Jay Garner til at leiða fyribilsstjórnina í Irak.

- Jay Garner hevur gott samband við Ísrael, og avgerðin at tilnevna hann er ein ábending um málið hjá heykunum í Bush-stjórnini, sigur Hassan Nafaa, sum er leiðari á samfelagsvísindaligu deildini á lærda háskúlanum í Kairo.

- Málið hjá teimum er, at USA skal hava eitt hernaðarligt stýri í Irak í einari tillagingartíð, áðrenn landið fær eina stjórn, sum verður fullkomiliga knýtt at USA, og tað fer at krevja, at amerikanararnir verða verandi í landinum, sigur Nafaaa.

Hann ivast ikki í, at tað, sum fer at henda í Irak, fer at ávirka øll tey arabisku londini.

Egyptiski eygleiðarin Makram Mohamed Ahmed heldur, at amerikansku herdeildirnar fara at møta mótstøðu, steðga tær ov leingi í Irak.

- Arabisk lond bera ótta fyri, at talan verður um eina beinleiðis herseting, og eg fái vænti ikki, at irakararnir fara at góðtaka eina slíka herseting. Verður steðgurin hjá amerikansku hermonnunum ov drúgvur, fara irakar at gera mótstøðu, sigur tann egyptiski eygleiðarin.

Almenna egyptiska blaðið Al-Ahram skrivaði í vikuni, at heykarnir í Bush-stjórnini hava ikki givið sær far um tey arabisku londini ella uttanríkisráðið í Washington við at tilnevna Jay Garner til leiðara í fyribilsstjórnini í Irak aftan á kríggið.

- Vit vita, at hesin fyrrverandi generalurin hevur gott samband við Ísrael, og júst Ísrael verður tað landið, sum fær mest burtur úr krígnum, skrivaði blaðið hjá egyptisku stjórnini.

Sambært ærlanini, sum amerikanararnir kunngjørdu tann 7. mars, verður Irak býtt sundur í trý øki, og Jay Garner verður ovasti leiðari í øllum trimum økjunum.

Tað óstýriliga Irak

USA hevur tilnevnt 43 irakar, sum skulu taka lut á einum fundi um framtíð landsins aftan á Saddam Hussein. Fundurin verður ætlandi í morgin, men tann stóri spurningurin er, um tann amrikanska ætlanin kann nýtast.

AFTAN Á KRÍGIÐ
Árni Joensen:

Eftir ætlanini skulu teir 43 iraksku leiðararnir, sum amerikanska stjórnin hevur funnið fram, á fund í morgin um, hvat skal henda í Irak, tá Saddam Hussein er fallin. Á fundinum verða eisini tríggir týðandi amerikanskir embætismenn.

Men ber tað til at skipa Irak sum eitt demokratiskt land, soleiðis sum amerikanarar ætlað? Fleiri eygleiðarar halda, at tað frægasta svarið er, at eitt demokratiskt stýrislag kann ikki nýtast í Irak orsakað av landsins etnisku og átrúnarligu viðurskiftum.

Og amerikansku fundarfyrireikararnir hava longu fingið sjón fyri søgn. Tann týdningarmesti shiamuslimski felagsskapurin, SCIRI, hevur boðað frá, at hann fer ikki at senda umboð á fundin.

- Vit fara ikki á fund. Eftir okkara tykki er hetta eitt tekin um tað komandi amerikanska harravaldið í Irak, og vit ætla okkum als ikki at verða partur í hesari verkætlanini, sigur talsmaðurin hjá SCIRI, Hamid al-Bayeti.

Útlagnir shiamuslimskir irakar, sum halda til í Iran, eru ikki bodnir á fundin, og teir hava boðað frá, at teir ætla sær ikki at lýða harraboð frá einari amerikanskari leiðslu, hvørki í Bagdad ella Washington. Leiðari teirra segði í síðstu viku, at USA spælir við eld.

Eitt sprøklut teppi

Arabisku londini tykjast sum nevnt í greinini niðanfyri vera á einum máli um, at irakar skulu ráða í Irak. Spurningurin er bara: Hvørjir irakar? Landið er sett saman av einum ótali av etniskum bólkum, ættum, ættarbólkum og trimum fólkabólkum, sum eru kurdarnir har norðuri, sunnimuslimarnir mitt í landinum og shiamuslimarnir har suðuri. Og so er vert at hava í huga, at av teimum 26 milliónunum í landinum eru shiamuslimarnir í meiriluta.

SCIRI er tann størsti andstøðufelagsskapurin hjá shiamuslimunum, og hann hevur sum nevnt boðað frá, at hann fer ikki á fundin, sum amerikansrarnir hava fyrireikað. Teir báðir kurdisku felagsskapirnir, PUK og KDP, hava ræði á sínum viðhaldsfólki, men kurdarnir eru lítið meiri enn ein fimtapartur av fólkinum í Irak. Hjá sunnimuslimunum eru tað tveir felagsskapir, INC og INA, sum kunnu sigast at hava nakran týdning. INA hevur tann veikleika, at nógvir av hansara leiðarum eru útlagnir fyrrverandi heryvirmenn. Hjá INC er trupulleikin, at nógvir irakar hava ikii álit á leiðaranum, Ahmed Chalabi, tí teir halda hann vera eitt, sum bara hongur í hølunum á amerikanarunum.

Irak hevur ongantíð í landsins 7000 ára longu søgu verið eitt demokrati, hvørki eftir vesturlendskum ella islamskum mátistokki, og flestu eygleiðararnir ivast í, at USA er ført fyri at "læra irakar pluralismu", sum sagt verður.

Verri enn Saddam

Verður Irak demokrati, og tann shiamuslimski meirilutin vinnur eitt demokratiskt val, er tað neyvan í samsvari við amerikansku ætlanina.

- So verður Irak eins og eitt Hizbollah-land við Mohammed Baqir, ayatollah sum leiðara. Og so endar Irak og alt økið í einari støðu, sum verður uppaftur verri enn Saddam Hussein, sigur ísraelski Miðeystursserfrøðingurin Guy Bichor.

- Ella sagt við øðrum orðum: Irak aftan á Saddam Hussein kann enda sum Jugoslavia aftan á Tito, sigur hann.